**Almannastovan**
Jónas Broncksgøta 27 – Postrúm 3096
Tlf. 315480 – Telefax 318850
FO-110 Tórshavn

# Leiðari á Tænastudeildini

**Almannastovan søkir eftir deildarleiðara til Tænastudeildina at byrja skjótast til ber.**

Uppgávurnar hjá Tænastudeildini eru m.a. at umsita journalskipanina fyri alla Almannastovuna, at umsita móttøku og telefon hjá leiðsluni, toymunum, deildunum. Deildin er nýstovnað og er mannað við fimm málsviðgerum. Arbeiðsøkið er alt landið.

**Arbeiðs- og ábyrgdarøki:**
- Deildarleiðarin hevur ábyrgd av leiðslu, ráðlegging og samskipan av deildini.

**Høvuðsuppgávurnar eru m.a.:**
- At viðvirka til, at deildin er í støðugari menning og skipa arbeiðið soleiðis, at stovnurin hevur eina skipaða og álítandi tænastuveiting
- At viðlíkahalda og menna elektronisku journalskipanina (Scan-Jour)
- At skráseta, goyma og varðveita øll savnini frá øllum pørtum av Almannastovuni
- At tryggja, at arbeiðið er skipað í samsvar við lógir og reglur á økinum
- At tryggja eitt alsamt betri samskifti millum deildir og fakbólkar á stovninum og harvið menna eitt tvørfakligt samstarv
- At starvsfólk trívast, mennast og verða stuðlað og eggjað til størri sjálvstøðu, sjálvræði og ábyrgd í arbeiðinum

**Førleikakrøv:**
- Viðkomandi fakliga útbúgving
- Ástøðiliga útbúgving innan EDV
- Umfatandi vitan og kunnleika um elektroniska journalføring
- Arbeiðsroyndir innan økið frá privatari ella almennari umsiting
- Evni at seta í verk fyriskipanir
- Evni at eggja og menna starvsfólk
- Góð samstarvsevni
- Góð evnir at orða seg bæði munnliga og skrivliga
- Leiðsluroyndir og kunnleiki til almannaverkið er ein fyrimunur

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið er lønt sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið og er lønt í lønarbólki VI. Leiðarin hevur tilvísing til stjóran. Vegna bygnaðarbroytingar kann ein ávís tillagingartíð væntast.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Petru J. Joensen, stjóra, á tlf. 315480 millum kl. 09.00 og 13.00.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**Almannastovan**
J. Broncksgøta 27
Postboks 3096
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 10. juni 2002**
Vinarliga merki brævbjálvan »Leiðari á Tænastudeildini«.

FØROYA LÆRARASKÚLI

# Størv á Føroya Lærarskúla

Hevur tú hug at royna teg í einum mennandi pedagogiskum starvi í støðugari broyting, hava vit eina spennandi avbjóðing til tín á Føroya Lærarskúla.

Føroya Lærarskúli hevur til uppgávu at útbúgva lærarar og pedagogar. Útbúgvingin er skipað við fastari tímatalvu, sum við jøvnum millumbilum verður niðurløgd til frama fyri evnis- og verkætlanararbeiði.
Størvini, sum leys eru at søkja eru hesi:

**Støddfrøði:** Hetta er tímalærarastarv. Uppgávuøkið er grundlærugreinin støddfrøði í 1. flokki á læraraútbúgvingini.
Tímatalið er 7,5 um vikuna.

**Føroyskt:** Hetta er tímalærarastarv. Uppgávuøkið er grundlærugreinin føroyskt og linjugreinin føroyskt á læraraútbúgvingini, møguliga eisini á pedagogútbúgvingini. Endaliga ásetingin av undirvísingini verður ásett í samstarvi við læraran, sum er í føstum starvi í føroyskum.
Tímatalið er 7 tímar um vikuna.

**Týskt:** Hetta er tímalærarastarv. Uppgávuøkið er linjugreinin týskt á læraraútbúgvingini.
Tímatalið er 7,5 tímar um vikuna.

**Enskt:** Hetta er tímalærarastarv. Uppgávuøkið er linjugreinin enskt á læraraútbúgvingini.
Tímatalið er 7,5 tímar um vikuna.

**Drama:** Hetta er tímalærarastarv. Uppgávuøkið er drama á pedagogútbúgvingini og læraraútbúgvingini.
Tímatalið er 11 tímar um vikuna.

**Samtíðarkunning:** Uppgávuøkið er samtíðarkunning í 1. flokki á læraraútbúgvingini. Tímatalið er 6 um vikuna.

**Danskt:** Uppgávuøkið er danskt í 1. flokki á læraraútbúgvingini. Tímatalið er 10 um vikuna.

**Námsfrøði og starvslæra:** Uppgávuøkið er almenn og starvslig námsfrøði og starvslæra á pedagogútbúgvingini. Tímatalið er 9 um vikuna.

**Samfelagsfrøði:** Uppgávuøkið er samfelagsfrøði á pedagogútbúgvingini. Tímatalið er 2,5 um vikuna.

**Skriving:** Uppgávuøkið er skriving á læraraútbúgvingini. Tímatalið er 3 um vikuna.

Tey, ið sett verða í størvini, eiga at hava útbúgving frá hægri góðkendum lærustovni, ella aðra útbúgving, sum hóskar til uppgávurnar.

Viðkomandi skulu vera fús at samskipa útbúgvingarvirksemið í teirra lærugrein ella lærugreinum við aðrar lærugreinar, m.a. í sambandi við evnisarbeiði og verkevni, og hava skyldu at luttaka í arbeiðsbólkum, útbúgvingunum at frama, og sum heild í øllum tiltøkum, sum sett verða í verk at menna útbúgvingarnar.
Eisini fáa tey, ið sett verða, møguleika at undirvísa á teimum eftirútbúgvingum, sum lærarskúlin setur í verk.

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya, ella avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknirnar skulu vera Føroya Lærarskúla í hendi innan 12. juni 2002. Setanin er galdandi frá 1. august 2002.

Tey, sum ynskja fleiri upplýsingar um størvini, eru væl komin at seta seg í samband við rektaran, ið er at hitta á tlf. 313501 ella tlf. 225328 ella á telduposti paulini@flsk.fo

**Føroya Lærarskúli**
Postsmoga 328 · FO-110 Trórshavn

Sosialurin

Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2648, P/F Sandoy Seafood, 240 Skopun.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Ásleyg Amalie Fríðvør Johannesen, 230 Húsavík.
Innkomin í nevndina: Jóan Petur Vest, 210 Sandur.

Skráseting Føroya tann 27. mai 2002

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. 2500, Føroya Sparikassi, 100 Tórshavn.

Navn: Føroya Sparikassi
Adressa: 100 Tórshavn
Felagið er strikað eftir samanlegging við skrásetingar-nr. P/F 3293, P/F 20.12.2001.

Skráseting Føroya tann 6. mai 2002

Kristin Balle

---




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 3293, P/F 20.12.2001, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 05.04.2001
Nýtt navn: P/F Føroya Sparikassi
Kapitalur:
Hækking: Kr. 638.612.000,00 til kr. 639.112.000,00.
Inngjaldingarháttur: Kr. 638.612.000,00 í samband við fusiónina.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Petur Marner Aage Jacobsen, Vørðubrekka 3, 160 Argir (formaður), Bjarni Olsen, Sandoyarbreyt 11, 100 Tórshavn og Høgni Jónsson Høgnesen, Javnagøta 12, 100 Tórshavn
Innkomin í nevndina: Petur F. Zachariassen, N. Mohrsgøta 11, 100 Tórshavn (formaður), Súni í Hjøllum, 650 Toftir (næstformaður), Signa Dimon, 950 Porkeri, Finnbogi Niclasen, 380 Sørvágur, Olga Kallsberg, Gæsugøta 22, 100 Tórshavn, Jaspur Olsen, 350 Vestmanna, Jonna Krog Poulsen, 210 Sandur og Durita Tausen, Brattalíð 10, kj, 100 Tórshavn.
Innkomnir sum starvsfólkavaldir nevndarlimir: Elinborg Jacobsen, í Heiðum, 370 Miðvágur, Tórmund A. Jacobsen, Millum Gilja 52, 188 Hoyvík, Bergun Kass, Jóansgøta 31, 188 Hoyvík og Rakul Dam, Orknoyarvegur 3, 100 Tórshavn.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Høgni Jónsson Høgnesen, Javnagøta 12, 100 Tórshavn.
Innkomnir sum stjórar: Petur Marner Aage Jacobsen, Vørðubrekka 3, 160 Argir, forstjóri og Bjarni Olsen, Sandáarbreyt 11, 100 Tórshavn.

Felagið er samanlagt við skrásetingar-nr. 2500, Føroya Sparikassi, sum samstundis verður strikað.

Skráseting Føroya tann 27. mai 2002

Kristin Balle

---

# Hallarvørður
## og/ella umsitari av kafeteria

Skála kommuna søkir eftir hallarvørði og umsitara av kafeteria til ítróttarhøllina á Skála. Størvini kunnu søkjast saman ella hvør sær.

***Hallarvørðurin:***

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:**
- at umsita útleigan av høllini, í samráð við bygdarráðið
- at røkja høllina og økið uttanum
- at gera umvælingar
- at ljós, hiti og sanitetsviðurskiftini eru í lagi
- at trygdarbúnaðurin virkar sambært ásettum treytum
- at halda reint og ruddiligt inni og uttanum høllina
- at hava umsjón við og samskipa reingerðina í høllini

**Førleikakrøv**
Tú skalt vera røkin, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevnir.

**Starvs- og setanarviðurskiftir**
Starvið er fulltíðarstarv við skiftandi arbeiðstíðum og verður sett frá 1. sept. 2002, – fyrsta árið er at roknað sum royndarár. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

***Umsitari av kafeteria:***

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:**
- at miða ímóti, at vit fáa eitt virkið kafeteria í bygdini
- sjálvstøðugt at reka kafeteria og útleigan av hølum, ið hartil hoyra
- at halda rúmini rein og ruddilig

**Førleikakrøv**
Tú skalt duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevnir.

**Starvs- og setanarviðurskiftir**
Tann, ið settur verður, kemur sjálvur at reka kafeteria. Starvið verður sett 1. sept. 2002 og er fyrsta árið at rokna sum royndartíð.

**Meiri fæst at vita**
Gjølligari upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til kommunuskrivaran tlf. 441179.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og møguligum viðmælum skal vera Skála kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. juni 2002. Viðmerkið umsóknina: Hallarvørður og/ella umsitari av kafeteria.

Bygdaráðið skilar sær rætt til at seta ein/fleiri av umsøkjarunum ella ongan at taka.

**SKÁLA KOMMUNA**

# Hygg her

Hví pussa og mála, tá ið tú kanst gera bæði í somu arbeiðsgongd.

Skalcem puss og betongmáling.

Nærri fæst at vita við at ringja á

**tlf. 455775**
Arne Samuelsen
Heygavegur 11 · 700 Klaksvík

# Rotatiónsprentari
## til Prentmiðstøðina

Eitt starv sum rotatiónsprentari er leyst at seta skjótast tilber.

***Starvið:***
Talan er um eitt starv sum rotatiónsprentari á blaðprentsmiðjuni við Smyrilsveg har øll tey føroysku dagbløðini, umframt onnur bløð, verða prentað.

Vit kunnu bjóða tær:
- fast arbeiði við góðari løn
- sjálvstøðugt arbeiði
- neyðuga upplæring
- møguleika fyri at menna prentsmiðjuna og teg sjálvan

***Førleiki:***
- útbúgvin prentari
- hava áhuga at prenta við rotatión
- vera nærlagdur og kenna ábyrgd

***Setan:***
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Prentsmiðjufelag og Føroya Prentarafelag.

***Umsókn:***
Skrivlig umsókn skal vera Prentmiðstøðini í hendi í seinasta lagi 10. juni 2002.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðun Húsgarð á tlf. 351400 ella 213514.

**Prentmiðstøðin**
Smyrilsvegur 13 • FO-100 Tórshavn
Tlf. 351400 • Fax 351401

# Roknskaparleiðari

Til eitt handilsvirki við høvuðssæti í Tórshavn verður søkt eftir einum roknskaparleiðara. Í bókhaldinum starvast frammanundan tvey fólk, men við vaksandi virksemi er tørvur á einum fólki afturat at standa fyri roknskapardeildini.

Arbeiðið umfatar alt vanligt bókhalds- og roknskapararbeiði og aðrar fyrisitingarligar uppgávur, sum hoyra til hetta.

Tann, ið setast skal í starvið, má hava góðan kunnleika til bókhald og roknskap og vera førur fyri sjálvstøðugt at leiða arbeiðið. Praktiskar royndir frá vinnulívinum eru tí ein treyt.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast skjótast gjørligt. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. juni 2002.

ELDING
CATERING – ALT INNAN STÓRKØK

Sosialurin
www.sosialurin.fo